VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Skrið ella stormur av landnyrðingi, seinnapartin nakað minni vindur av norði. Ælingur, partvís vátakavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.



Veðrið hósdagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av norði, um kvøldið minni vindur. Sólglottar, men kanska okkurt kavaælið. Hitin millum frostmarkið og +3 stig – fríggjanáttina niður í ÷3 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitalagið um frostmarkið.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin upp í hvassan vind av landsynningi og avfall, partvís kavi. Sunnudagin minni vindur av útsynningi og ælingur. Hitin millum frostmarkið og + 4 stig.

»Freeze« segði politisturin

Ein góður eginleiki hjá einum og hvørjum løgreglumanni er, at vera fullkomiliga ísakaldur, tá ið á stendur. Sosialurin hevur hitt Føroya kaldasta løgreglumann, sum bíðar eftir løtuni, har hann kann rópa »freeze« eftir einum búrkroppi

LØGREGLUTÍÐINDI
Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

Ein hvør amerikanskur actionfilmur við virðing fyri sær sjálvum, hevur eina leikmynd við einum løgreglumanni, sum rennur eftir einum búrkroppi og at enda rópar »freeze«, og búrkroppurin steðgar sum var hann frystur.

Neyvan hevur hesin løgreglumaðurin, sum myndamaðurin hjá Sosialinum kom fram við í morgun, nakrantíð hevur rópt »freeze« eftir nøkrum. Eingin ivi fær tó verið um, at hann »kaldasti« løgreglumaðurin í landinum.

Hetta er synd, vildi onkur kanska sagt, men tað kemst ikki undan, at ein tann fremsti eginleikin hjá einum og hvørjum løgreglumanni er, at vera púra »kaldur«, tá ið á stendur. Rætt og slætt ísakaldur, soleiðis at hann ikki letur seg ávirka av støðuni, hann er í.

Í so máta má hetta vera landsins besti løgreglumaður. Tá Sosialurin steðgaði framman fyri honum í morgun, læt hann ikki við seg koma. Ei heldur, tá myndamaðurin trein út úr Snar og »skeyt« nakrar myndir av eftir honum, tóktist tað at rína við.

Framvegis var hann ísakaldur. Fullkomiliga óávirkaður av støðuni stóð hann í politigarðinum og eygleiddi, hvørjir bilar og fólk fóru framvið í Jónas Broncks gøtu í Havn; bíðaði eftir løtuni at sleppa at rópa »freeze« eftir onkrum.

Hesin prýðiligi kavamaðurin stóð í politigarðinum í morgun
Mynd: Jens Kristian Vang

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-5
Nuuk	-4
Qaqortoq	3
Ammassalik	-7
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	-3
Seyðisfjørður	-1
Tórshavn	2
Lerwick	3
Aberdeen	4
London	9
Tromsø	--
Bergen	2
Oslo	--
Stokkhólm	0
Keypmannah.	3
Helsinki	-6
Moskva	-6
Berlin	6
Warzawa	0
Kiev	-5
Bukarest	3
Paris	9
Madrid	12
Róm	15
Malorca	15
Athen	11
Malta	17
Tunis	16
Beijing	7
New Dehli	24
Bangkok	32
Jakarta	31
Sydney	--
New York	1
Miami	26
Los Angeles	14
Meksikobýur	--
Panama	--
La Paz	--
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	28

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 973 hPa. vestan fyri Skotland fer í landnyrðing eystan og dýpist. Tað gevur storm og avfall í Føroyum komandi samdøgur.



Í dag:
Djúpa lágtrýstið í landsynning úr Føroyum fer spakuliga í landsynning og dregur kaldari luft móti Føroyum

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 26/2 kl. 06^{00}– 27/2. 06^{00}. Hitin í gjár: 0,6°
Minsti hiti máldur í februar: -11° - Mesti hiti máldur í januar: 11,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2,0 mm – mált frá 26/2 kl. 06^{00}– 27/2 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í februar: 132,0 mm

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com

VESTFALLSKYRRINDI

19. februar	Mánin næstur jørðini
24. februar	Fyrra kvarter
3. mars	Fullmáni
7. mars	Mánin longst frá jørðini

Kelda: Ámanakkin 2007

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
27. Febr	03.11	15.37	02.11	14.37	02.26	14.52	05.11	17.37	06.11	18.37	01.26	13.52	00.26	12.52	03.26	15.52	04.26	16.52	02.56	15.22	04.11	16.37
28. Febr	04.03	16.27	03.03	15.27	03.18	15.42	06.03	18.27	07.03	19.27	02.18	14.42	01.18	13.42	04.18	16.42	05.18	17.42	03.48	16.12	05.03	17.27
1. Mars	04.52	17.14	03.52	16.14	04.07	16.29	06.52	19.14	07.52	20.14	03.07	15.29	02.07	14.29	05.07	17.29	06.07	18.29	04.37	16.59	05.52	18.14
2. Mars	05.37	17.52	04.37	16.52	04.52	17.07	07.37	19.52	08.37	20.52	03.52	16.07	02.52	15.07	05.52	18.07	06.52	19.07	05.22	17.37	06.37	18.52
3. Mars	06.17	18.37	05.17	17.37	05.32	17.52	08.17	20.37	09.17	21.37	04.32	16.52	03.32	15.52	06.32	18.52	07.32	19.52	06.02	18.22	07.17	19.37

GEVID BLÓÐ